# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Minningarorð um granna- og vinkonu mína

# Ada Maria Olsen

**8. mai 1935 – 19. desember 2008**



Nú er eitt ár liðið, síðani tú so brádliga andaðist á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn. Vit vóru í holt við at flyta úr Vestmanna til Havnar í desember mánað í fjør. Eg helt tað vera so keðiligt, at vit fluttu, akkurát meðan tú vart niðri, so eg legði ikki jólakortið í postkassan, tí eg ætlaði mær inn á gólvið við tí seinri í mánaðinum, tá tú vart heimafturkomin. Púra óvæntað skuldi tað ikki verða so.

Vit kendust bert í góð fýra ár, men sóust næstan dagliga ta tíðina. Vit gingu túrar og trillaðu, gjørdu ørindi saman og ikki at gloyma allar drekkamunnarnar. Tað var altíð so hugnaligt, tá tú stakk høvdið innum.

Familjan hevði nógv at týða fyri teg. Tær dámdi væl at fortelja nýtt úr Grønlandi, Danmark og eisini hvussu tað gekst teimum nærmastu í bygdini. Tá Andrias (ein abbasonur bróður tín) var á rannsóknarferðini Galathea 3, vóru vit hvønn dag á netinum og lósu úr dagbókini, sum hann skrivaði. Tú vart so spent at vita, hvussu hann hevði tað, og hvat hann hevði at siga frá.

Børnini høvdu eitt stórt pláss í tínum hjarta, og tað merkti okkara Hjalti eisini. Tit vóru so ómetaliga væl. Tá hann kom heim úr barnagarðinum, spurdi hann altíð, um vit kundu fara inn at vitja Adu. Niðasta skuffa í køkinum var full við bilum, og Ada tímdi so væl at spæla.

Tað er so mangt í dagligdegnum, sum minnir um løturnar, vit høvdu saman. Pyramiduformaðu fruktteposarnir (tær dámdi so væl fruktte), eitt tómt súltutoysglas, sum einaferð var fult við gummibommum. Leikur og undirklæði, sum Hjalti fekk frá tær, verða nú tikin fram aftur til lítlabeiggja, sum tú ikki náddi at síggja. Tú vart so spent at vita, hvat kyn tað bleiv, og kom altíð inn at spyrja, hvussu eg hevði tað, og um mær manglaði nakað. Altíð so røsk at hjálpa og at renna ørindi fyri tey, ið høvdu brúk fyri tí. Tí sjálvt um tú hevði aldur, so vart tú ung bæði í sinn og skinn.

Ikki náddu vit handan biltúrin til Havnar, so tú kundi síggja okkara nýggja heim, men her í húsinum tosa vit um teg av og á, og eg hugsi ofta um teg við sorgblídni.

Saknurin er stórur. Ærað veri minnið um teg, góða Ada.

**Hildur**

# Hensar Ellingsgaard farin



Sunnudagin 24. januar andaðist Hensar Ellingsgaard, fyrrverandi landsskúlastjóri, í Havn, 75 ára gamal.

Hensar var føddur 12. august 1934 á Eiði, har hann eisini vaks upp. Foreldur hansara vóru Hans J. Ellingsgaard, trúðboðari av Eiði, og Kathrina f. Davidsen úr Tjørnuvík.

Aftan á barnaskúlan fór Hensar til skips og arbeiddi annars fyrifallandi arbeiði í heimbygdini.

Í 1952-1953 var Hensar næmingur á Føroya Fólkaháskúla, og í 1954 fór hann á Føroya Læraraskúla og tók prógv sum lærari í 1958. Hann fekk sama ár starv sum einalærari á Viðareiði. Har starvaðist hann í 6 ár, til hann í 1964 flutti vestur til Sørvágs, har hann í 1965 varð settur sum fyrstilærari og seinni sum skúlastjóri.

Hensar var skúlastjóri í Sørvági til 1981, tá hann flutti til Havnar at arbeiða sum námsfulltrúi á Landsskúlafyrisitingini. Fimm ár seinni, í 1986, varð hann settur sum Landsskúlastjóri á sama stovni. Tá hesin stovnur í 1998 varð umskipaður til tað, vit í dag kalla Mentamálaráðið, varð Hensar settur sum deildarleiðari fyri fólkaskúlan í hesum ráði. Hetta starv rókti hann til 2001, ta hann vegna aldur segði starvið frá sær.

Hensar giftist við Gretu Ellingsgaard f. Sørensen, fyrrverandi lærara, og eiga tey fingu tríggjar døtur: Kirstin, ið býr í Kaldbak, Birgittu, ið býr í Keypmannahavn og Helgu, ið býr í Sveis.

-red

## Merkisdagar

**90 ára føðingardagur**
Hósdagin 28. jan. fyllir Eigil Gunnarsson í Havn 90 ár. Føðingardagurin verður hildin í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, J. H. Schrøtersgøta. 9, millum kl. 16 og 20, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**90 ára føðingardagur**
Sunnudagin 31. jan. fyllir Anna Louisa Jacobsen í Skálafirði 90 ár. Dagurin verður hildin í Kelduni í Skálafirði frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**80 ára føðingardagur**
1. feb. verður Hans Poulsen, Klaksvík, ættaður av Eiði, 80 ár. Føðingardagurin verur hildin 6. feb. hjá dótturini í Kristiansgøtu 37, Hoyvík frá kl. 17.

**60 ára føðingardagur**
Mánadagin 25. jan. fylti Jóna Borg Dahl, í Vági, 60 ár. Dagurin verður hildin í Billardhúsinum leygardagin 30. jan. frá kl. 13 til 17, har øll eru vælkomin.

**Diamantbrúdleyp**
Hósdagin 28. januar hava Frida og Andrew Thomsen í Porkeri diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

**Diamantbrúdleyp**
Fríggjadagin 5. febr. hava Aðalbjørg og Sigurd Joensen í Oyndarfirði diamantbrúðleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík leygardagin 6. feb., kl. 15, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gullbrúdleyp**
Fríggjadagin 29. jan. hava Ingibjørg og Olfert Debes á Oyri gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við familju, leygardagin 30. jan.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 30. jan. hava hjúnini Anny og Pole Klein, Vestmanna, gullbrúdleyp. Tey, ið vilja heilsa uppá gullbrúðarparið, eru vælkomin millum kl. 11 og 15 til morgunmat í kaffistovuni inni á Fjørð.

**Gullbrúdleyp**
Sunnudagin 31. jan. hava hjúnini Sonja og Hans Olaf Andersen í Lopra gullbrúdleyp. Tey eru burturstødd.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 2. feb. hava Jóhan Petur S. og Lis Olsen silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í kafeteria í Kelduni í Skálafirði týskvøldið 2. feb. frá kl.18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Brúdleyp**
Leygardagin 6. februar. giftast Niza Pardillo, av Filipsoyggjunum og Hans Hilmar Johannesen av Toftum. Vækomst verður á Svangaskarði kl. 19. Tey, ið ynskja, at gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um, at siga frá á tlf. 748134/448134 innan 2. februar.

## Dagurin

**26. januar. Polycarpos**, deyður umleið ár 155. Var biskupur í Smyrna og høgt mettur kirkjumaður í Lítluásia. 86 ára gamal verður hann píndur og tikin av døgum. Navnið hevur enntá í nýggjari tíð verið brúkt sum mansnavn í Føroyum, Karpus.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*